KLAKSVÍKAR KOMMUNA Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Faroe Islands . Tlf. 410000 . Fax. 410001

Klaksvíkar Býráð

Dagfesting: 21.04.2016 kl. 17:30
Málnr.: 13/00245 Gerðabók

Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Steinbjørn O. Jacobsen, Gunvá við Keldu, Jóhann Lützen, Kristian Eli Zachariasen, Signhild V. Johannesen, Eyðstein Ó. Poulsen, Erling Petersen, Atli S. Justinussen og Herfrí J. Sørensen.

Varalimir: Karl Marius Poulsen fyri Óluvu Klettskarð.

Onnur: Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, stjórnarskrivari

Málsyvirlit		
Til viðgerðar		
26/16	16/00497-1	Býráðslimur burturstaddur - Óluva Klettskarð
27/16	12/01074-27	Skúlabygging í Klaksvík - Útbjóðingartilmæli
28/16	15/00135-24	Íløgustuðul til Spinnaríið
29/16	16/00426-2	Umsókn um sundurbýti av matr. 16, Norðoyri - Jórun Høgnesen
30/16	16/00435-4	Innlating/víðarisøla av grundstykki, matr. nr. 1006y - Emma W. Olsen
31/16	15/00166-11	PhD-granskingarverkætlan um samstarvandi læringshættir – Andriása Dam Joensen - *eykajáttan, fyrra viðgerð*
32/16	16/00330-1	Nýggjan arbeiðsbil til Vegadeildina - *eykajáttan, seinna viðgerð*
33/16	12/01094-17	Nýggjur bilur, Spillivatnssamskiparin - *eykajáttan, fyrra viðgerð*
EYKAMÁL 37/16	15/01017-41	Rennibreyt - byggiætlan

26/16
16/00497 Býráðslimur burturstaddur - Óluva Klettskarð

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Klaksvíkar Býráð	21.04.2016	26/16	

Frágreiðing um málið:
Óluva Klettskarð, býráðslimur, hevur í dag boðað borgarstjóranum frá, at henni berst frá at røkja starvið í meria enn samfullar 14 dagar og tí ynskir, at fyrsti varalimur floksins fær boð at møta til býráðsfundin í kvøld, 21. apríl 2016.
Sambært fundarútskrift frá Valnevndini frá 14. nov. 2012 er fyrsti tiltakslimur floksins Karl Marius Poulsen.

Lógargrundarlag:
KSL, § 18:

> *Stk. 2*. Berst kommunustýrislimi væntandi frá at røkja starv sítt í meira enn 14 samfullar dagar vegna annað alment starv, heilsustøðu ella aðra lógliga orsøk, skal viðkomandi boða borgarstjóranum frá, og borgarstjórin skal síðani geva tiltakslimi fundarboð.
> *Stk. 3*. Kommunustýrið ger av, um treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi eru loknar.

Fíggjarligar avleiðingar:
Fundarsamsýning til varalimin, um býráðið avger at lata hann taka sæti í býráðnum til fundin

Tilmæli:
Mælt verður býráðnum til at lata Karl Marius Poulsen taka sæti á fundinum 21. apríl 2016.

Býráðsins samtykt 21-04-2016
Einmælt samtykt, og Karl Marius Poulsen tók sæti í býráðnum.

27/16
12/01074 Skúlabygging í Klaksvík – Útbjóðingartilmæli

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Fíggjarnevndin	19.04.2016	33/16	
2 Klaksvíkar Býráð	21.04.2016	27/16	

Frágreiðing um málið:
Byggingin á Skúlatrød er nú komin somikið langt, at klárt er at fara undir triðju og seinastu útbjóðingina.

Fyrstu útbjóðingina vann Norðhús, sum var at gera skúlagarðin niðan móti Heygavegnum.

Aðru útbjóðingina vann Kanjon eisini, og fevndi arbeiðið um planering, fundamentir, tøknirúm, leiðingar og annað í samband við nýggja skúlan. Hetta arbeiðið hevur verið í gongd seinastu tíðina, og er hetta um at verða liðugt.

Seinasta útbjóðingin skal nú fáast frá hondum, og eru Fuglark lidnir við projekteringina av hesum parti. Fuglark eru, saman við byggiharraráðgevanum, komnir við einum tilmæli um, hvussu ein innboðin lisitatión best verður gjørd.

Í viðhefta skjali sæst yvirlit yvir fyritøkur, ið eftir ætlan verða bodnar til hesa lisitatión.

Áður nevndi útbjóðingarháttur hevur verið nýttur í samband við stórar verkætlanir, ið kommunan hevur staðið fyri seinnu árini. Nevnast kann Skúlin við Ósánna og Heimið við Vágna.

So skjótt, sum býráðið hevur samtykt útbjóðingina endaliga, kann tilfarið sendast avvarðandi fyritøkum, so tilboðini kunnu vera kommununi í hendi skjótast gjørligt.

Skúlabyggingin verður eftir ætlan liðug til skúlabyrjan 2018 (august 2018).

Fíggjarligar avleiðingar:
Tann samlaði fíggjarkarmurin á 100 mió. kr. + mvg fyri skúlabyggingina á Skúlatrød er áður samtyktur, og ikki fyrr enn tann í hesum máli umrødda útbjóðing hevur verið, kunnu fíggjarligu avleiðingarnar av hesum parti verða staðfestar.

Tilmæli:
Vísandi til omanfyristandandi verður mælt til at taka undir við viðfesta tilmæli um útbjóðing í hesum triðja útbjóðingarumfari á Skúlatrød.

FíN 19-04-2016: Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Jóhann Lützen, Signhild V. Johannesen og Eyðstein Ó. Poulsen, tekur undir við tilmælinum frá umsitingini, dagfest 15-04-2016. Ein minniluti, Atli S. Justinussen, tekur støðu á býráðsfundinum 21-04-2016.

Býráðsins samtykt 21-04-2016
Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá SOJ, dagf. 21.04.2016:
Undirritaði vil mæla Býráðnum til at víðka útbjóðingina til at vera almenn útbjóðing, uppá fylgjandi arbeiðstøkur: jørð, kloakk, betong, stál, tekju (bjálving + dúkur), timbur, snikkara og smiðju.
Broytingaruppskotið fall við 2 atkvøðum fyri (SOJ og ASJ) og 9 atkvøðum ímóti (JS, KMP, JL, SVJ, KEZ, GvK, EP, EÓP og HJS).

Síðani varð atkvøtt um meirilutatilmælið í FíN 19-04-2016. Tað var einmælt samtykt.

28/16
15/00135 Íløgustuðul til Spinnaríið

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Mentanarnevndin	11.04.2016	19/16	
2 Fíggjarnevndin	19.04.2016	25/16	
3 Klaksvíkar Býráð	21.04.2016	28/16	

Frágreiðing um málið:
Víst verður til skriv 22. mars 2016 frá Eyðbjørn Poulsen, nevndarformanni í grunninum Spinnaríið. «Nevndin fyri Grunnin metir seg nú vera komna á eitt vegamót. Vit gera nú eina síðstu roynd, og tað er, at bygningurin, sum hann stendur, verður umvældur somikið, at hann kann brúkast til almenn gagnlig endamál. Okkara ráðgevi, FuglArk, metir, at kostnaðurn verður 5,9 mió.kr, sí viðfesta fylgiskjal. Tá er klárt at seta lyftu inn í bygningin, tvs. at veggir kring lyftuna eru gjørdir, men sjálv lyftan er ikki við í

kostnaðinum. Ætlanin hjá nevndini er at arbeiða við at fáa stuðul til lyftuna. Sostatt resta 2,5 mió. kr. í at gjøgnumføra hesa ætlanina».

Teir eiga í stuðlum 1,4 mill
Kommununnar tilsøgn 11. des. 2015 2,0 mill (peningurin latin, tá ið byggingin er liðug)
Umvæling av verandi bygningi 5,9 mill
Tá er síðubygningur ikki við, men kjarni til lyftu í verandi bygningi er við (søkja um tað serskilt)
Vantandi stuðul at fremja bygging 2,5 mill
Biðið verður tí um 2,5 mill - afturat teimum 2,0 mill, sum longu eru játtaðar

Peningurin verður at seta av á fíggjarætlanina til endamálið.
Sambært Eyðbjørn verður byrjað á vári 2016, um tilsøgn verður uppá allar 4,5 mill frá kommununi.

Sambært Jákup Paula Johannesen frá FuglArk er byggitíðin um 10 mánaðar – alt eftir nær á árinum byrjað verður.

Mælt verður til, at ein møgulig víðkað tilsøgn verður eftir sama leist, sum í kommununnar skrivi 11. des. 2015.

Lógargrundarlag:
Fíggjarætlan

Fíggjarligar avleiðingar:
At sett verður av til endamálið – kanska yvir tvey ár

Tilmæli:
Mælt verður til at hækka tilsøgnina um stuðul, so at samlaða tilsøgnin verður 3 milliónir. Umframt íløgustuðulin, hava nevndir og býráð samtykt at játta ein árligan rakstarstuðul á kr. 250.000,-, sum framhaldandi verður galdandi. Verandi tilsøgn verður tillagað samsvarandi.

MeN 11-04-2016: Ein meiriluti, Signhild V. Johannesen, Óluva Klettskarð og Jóhann Lützen, tekur undir við tilmælinum. Ein minniluti, Gunvá við Keldu og Eyðstein Ó. Poulsen, vil hækka játtanina við tveimum milliónum, tvs. fýra milliónir tilsamans.

FíN 19-04-2016: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini, dagfest 5. apríl 2016, og mælir til at hækka rakstrarstuðulin til kr. 300.000,- vísandi til samskiftið við grunnin Spinnaríið.

Býráðsins samtykt 21-04-2016
Tilmælið frá FíN 19-04-2016 einmælt samtykt.

29/16
16/00426 Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 16, Norðoyri

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	11.04.2016	26/16	
2 Klaksvíkar Býráð	21.04.2016	30/16	

Frágreiðing um málið:

Søkt verður um sundurbýti av matr. nr. 16 á Norðoyri, soleiðis at eitt grundøki uppá uml. 480 m^2 verður frábýtt til sjálvstøðuga ogn.
Byggisamtyktarliga er talan um A1-øki (Blandað íbúðar- og vinnuøki)

Lógargrundarlag:
Matrikuleringslógin

Fíggjarligar avleiðingar:
Ongar – kommunan bert tilmælandi partur

Tilmæli:
Umsóknin samsvarar við ásetingarnar í byggisamtyktini. Mælt verður til at senda Umhvørvisstovuni málið við tilmæli um at játta sundurbýti.

UBN 11-04-2016: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting dagfest 04-04-2016.

Býráðsins samtykt 21-04-2016
Tilmælið frá UBN 11-04-2016 einmælt samtykt.

30/16
16/00435 Innlating/víðarisøla av grundstykki, matr. nr. 1006y – Emma W. Olsen

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	11.04.2016	29/16	
2 Fíggjarnevndin	19.04.2016	24/16	
3 Klaksvíkar Býráð	21.04.2016	30/16	

Frágreiðing um málið:

Talan er um eitt grundøki undir Grashjalla, sum á sumri 2012 var selt borgara, sum tann 26. januar 2015 fekk loyvið at selja grundøkið víðari.

Grundøkið varð víðariselt til annan borgara, sum nú ynskir, í fyrsta lagi at lata grundøkið innaftur til kommununa ella í øðrum lagi at fáa loyvi at selja tað víðari til annan keypara.

Fíggjarligar avleiðingar:
Verður stykkið tikið inn aftur, er óvist, um tað kann seljast aftur. Umsitingin vísir á konto: *Byggibúning, Bústaðir*.

Tilmæli:
Málið verður lagt fyri til umrøðu og støðutakan.

UBN 11-04-2016: Nevndin gevur eigaranum loyvi at selja stykkið víðari.

FíN 19-04-2016: Nevndin tekur undir við UBN 11-04-2016.

Býráðsins samtykt 21-04-2016
Tilmælið frá FíN 19-04-2016 einmælt samtykt.

31/16
15/00166 PhD-granskingarverkætlan um samstarvandi læringshættir – Andriása Dam Joensen – *eykajáttan (flyting millum høvuðskontur), fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Trivnaðarnevndin "Børn & Ung"	12.04.2016	16/16	
2 Fíggjarnevndin	19.04.2016	26/16	
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	21.04.2016	31/16	
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*			

Frágreiðing um málið:
Andriása Dam Joensen hevur vent sær til KK og á Skúlatrød í samband við, at hon fer undir at skriva eina phd ritgerð um samstarvandi læringshættir, kallað Samhugsa.

Granskingarverkætlanin SAMHUGSA er vorðin til við støði í enskari gransking á økinum seinni árini.

SPRinG átakið (http://www.spring-project.org.uk/AERA-SpringPaper.pdf) var ein stór verksetandi kanning, ið fyri nøkrum árum varð sett í verk í Bretlandi, sum hevur víst sera góð úrslit. Her verður bæði sipað til tað sosiala og trivnaðin, men eisini til royndarúrslitini hjá næmingunum (royndirnar, ið tey nýttu, kunnu samanberast við árligu landsroyndirnar í Føroyum).

Í stuttum hevur SAMHUGSA-verkætlanin (sum er føroyska tillagingin av SPRinG) sum endamál at betra um samstarvs- og kjakingarevnini hjá næmingunum og harvið eisini førleika teirra at læra. Við at nýta samstarvandi undirvísingarhættir gerast næmingar sum heild meira virknir í teirra arbeiði við teimum evnum, sum eru á skránni.

Sambært ensku úrslitunum tykist vera greitt, at fakligu úrslitini gerast munandi betri, bæði fyri einstaka næmingin og flokkar sum heild. Talan er um eina ítøkiliga arbeiðsgongd, sum tekur støði í gerandisdegnum hjá næmingunum sjálvum, og sum sostatt kennist viðkomandi fyri teir.

Andriása hevur verið í samband við lærarar á Skúlatrød, og tey síggja øll fram til eitt spennandi samstarv, tá ið verkligi parturin fer í gongd í komandi skúlári, 2016/17.

Borgarstjórin og trivnaðarstjórin hava sent Andriásu eitt ætlanarskriv um fíggjarligan stuðul, og Vagn Foldbo, skúlastjóri hevur givið tilsøgn til, at á Skúlatrød eru sinnað og áhugað í at samstarva við Andriásu.

Í ætlanarskrivinum stendur, at stuðulin, kommunan er sinnað at standa inni fyri samstarvi við aðrar stuðlar, er áljóðandi 346.209 kr., og sum fellur til gjaldingar yvir 4 ár.

Andriása hevur fingið fígging frá Granskingarráðnum.

Tíðarætlanin er broytt, so tað verður ikki fyrr enn í komandi skúlaári 2016/2017, at praktiski parturin av granskingarverkætlanini fer í gongd í Klaksvík.

Tá er tað, at lærararnir verða interviewaðir, fara at royna amboðini, og geva viðmerkingar, um hvussu gekk. Hetta er pilotfasan, og tað sum kemur burturúr tá, fer at verða brúkt til at tillaga øll amboð og undirvísingartilfar, ið fer at verða brúkt í seinnu fasuni, sum verður skúlaárið eftir.

Andriása hevur undirskrivað sáttmála við Granskingarráðið viðvíkjandi teirra parti av fíggjarliga stuðlinum. Tey fara at gjalda teirra part árliga. Um KK ynskir tað, ber væl til at flyta okkara part av stuðlinum til Granskingarráðið, soleiðis at alt verður goldið saman. KK kann sjálvsagt eisini velja at flyta peningin beinleiðis til universitetið.

Tað er ikki neyðugt at hava ein sáttmála millum KK og Andriásu, men um vit vilja hava tað, kann hetta gerast.

Lógargrundarlag:
Løgtingslóg um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 26. mai 2011, ásetur í § 2, stk. 1, at "uppgáva fólkaskúlans er við atliti at tí einstaka næminginum og í samstarvi við foreldrini at fremja, at næmingarnir nema sær kunnleika, fimi, arbeiðshættir og málbúnar, sum stuðla tí einstaka næminginum í fjølbroyttu, persónligu menningini", og víðari sigur stk. 2, at "fólkaskúlin eigur at skapa sovorðin líkindi fyri uppliving, virkishugi og djúphugsan, at næmingarnir kunnu menna sína sannkenning, sítt hugflog og hug til at læra, og at teir kunnu venja síni evni til sjálvstøðuga meting, støðutakan og virkan og búnast í treysti til sín sjálvs og til teir møguleikar, sum eru í felagsskapinum".
Endamálið við hesi PhD-granskingarverkætlan er júst í tráð við nevndu endamál í fólkaskúlalógini.

Fíggjarligar avleiðingar:
Samlaði kostnaðurin fyri alt tíðarskeiðið er fyri allar partar tilsamans kr. 1.039.630.
Samanlagdi parturin hjá KK at gjalda (ið er 1/3 av hesi upphædd) er sostatt kr. 346.544.

Fyri 2016 er upphæddin kr. 88.303.

Fyri komandi árini verða niðanfyri nevndu upphæddir útgoldnar, tá ið ársuppgerðin fyri undanfarna ár er móttikin og góðkend:

2017 – kr. 114.403

2018 – kr. 114.737
2019 – kr. 29.101

Sostatt er í ár talan um eina meirútreiðslu á knappar kr. 90.000,-, sum ikki hevur nakra beinleiðis játtan í samtyktu fíggjarætlanini fyri 2016, og verður tí neyðugt at fíggja hesa verkætlan við flyting millum kontur. Ein konta, har greið útlit tykjast vera fyri einum avlopi í mun til játtanina í inniverandi ári er henda:

Rakstrarstað	**Kontunr.**	**Kontunavn**	**Játtan 2016 (inntøkur)**	**Inntøkur fyri januar-apríl**	**Tvs. væntaðar inntøkur 2016**	**Tvs. væntað avlop 2016**
3261170026 Frítíðar-skúlin Snjallabjalla	217100	Brúkaragjøld	-849.000,00	-434.485,00	-1.086.212,50	-237.212,50

Fíggingin av granskingarverkætlanini kann sostatt útvegast við at flyta kr. 90.000,- frá omanfyri nevndu játtan og til rakstrarstaðið á Skúlatrød, konta 524500 ”Tilskot til einstaklingar – útbúgving, gransking o.a.”.

Tilmæli:
Trivnaðardeilin er av teirri sannføring, at talan er um áhugavert og mennandi tiltak, sum kemur okkara skúlabørnum tilgóðar, bæði her og nú og seinni í lívinum, og verður málið við hesum lagt fyri við tilmæli um samtykt.

TrN B&U 12-04-2016: Nevndin tekur undir við tilmælinum

FíN 19-04-2016: Nevndin tekur undir við TrN B&U 12-04-2016.

Býráðsins samtykt 21-04-2016
Tilmælið frá FíN 19-04-2016 einmælt samtykt.

32/16
16/00330 Nýggjan arbeiðsbil til Vegadeildina – *eykajáttan, seinna viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Tekniska Nevnd	09.03.2016	9/16	
2 Fíggjarnevndin	15.03.2016	18/16	
3 Klaksvíkar Býráð - *fyrra viðgerð*	17.03.2016	20/16	
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	21.04.2016	32/16	

Frágreiðing um málið:
Málið varð samtykt fyrru ferð samtykt av býráðnum 17. mars 2016.

TN 09-03-2016: Nevndin tekur undir við tilmæli frá TU 02-03-2016.

FíN 15-03-2016: Nevndin tekur undir við TN 9. mars 2016.

BýR 17-03-2016: Einmælt samtykt at taka undir við FíN 15-03-2016.

Býráðsins samtykt 21-04-2016
Einmælt samtykt við seinnu viðgerð.

33/16
12/01094 Nýggjur bilur - Spillivatnssamskiparin - *eykajáttan, fyrra viðgerð*

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	11.04.2016	23/16	
2 Fíggjarnevndin	19.04.2016	21/16	
3 Klaksvíkar Býráð – *fyrra viðgerð*	21.04.2016	33/16	
4 Klaksvíkar Býráð – *seinna viðgerð*	26.05.2016		

Frágreiðing um málið:
Fíggjarnevndin samtykti 10-11-2015, eftir tilmæli frá UBN 07-09-2015, at keypa ein el-bil til spillivatnsleiðaran fyri kr. 250.000,-. Bilurin skal fíggjast innan íløguøkið hjá UBN "*Kloakkir Íløgur*".

Tað eydnaðist ikki at fáa bilin avgreiddan í 2015, og tí verður málið avgreitt í 2016. Hetta viðførir, at fíggjarætlanin má broytast.

Lógargrundarlag:
Ongin viðmerking.

Fíggjarligar avleiðingar:
Fíggjarligar avleiðingar av málinum eru:
- at kr. 250.000,- skulu flytast frá *Kloakkir Íløgur* til *Maskinur Íløgur* (frá konto nr. 06304170176 til 06381370197).
- at samlaða avsetingin til *Kloakkir Íløgur* er 8,40 mió. kr. pr. 31-03-2016. Sambært hesum lækkar avsetingin til 8,15 mió. kr.
- at samlaða avsetingin til *Maskinur Íløgur* er 1,6 mió. kr. pr. 31-03-2016. Sambært hesum hækkar avsetingin til 1,85 mió. kr.

Talan er um boyting av fíggjarætlani fyri 2016, og Fíggjarmálaráðið skal kunnast.

Tilmæli:
Við hesum verður mælt nevndum og býráði til at taka undir við málinum.

UBN 11-04-2016: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting, dagfest 06-04-2016.

FíN 19-04-2016: Nevndin tekur undir við UBN 11-04-2016.

Býráðsins samtykt 21-04-2016
Tilmælið frá FíN 19-04-2016 einmælt samtykt.

EYKAMÁL
37/16
15/01017 Rennibreyt - byggiætlan

Viðgjørt av	Fundardagur	Málnr.	Váttað
1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin	11.04.2016	32/16	
2 Mentanarnevndin	11.04.2016	14/16	
3 Tekniska Nevnd	12.04.2016	12/16	
4 Fíggjarnevndin	19.04.2016	30/16	
5 Klaksvíkar Býráð	21.04.2016	36/16	

Frágreiðing um málið:
Tann 17. juni 2015 setti Jógvan Skorheim, borgarstjóri, ein byggibólk mannaður av Signhild Johannesen sum forkvinnu, Jóannes Petersen arkitekti, Guttorm Sørensen vegna Treysti, Tummas Lervig vegna KÍ, Torkil Mørkøre vegna stadionøkið og Mogens F. Petersen vegna teknisku umsiting.

Endamálið var at mynda eina byggiskrá til eina rennibreyt við fótbóltsvølli og møguleika at víðariútbyggja eina tekju yvir økið og herundir staðfesta tørv, krøv og ynskir í eina byggiskrá, ið síðani verður grundarlag fyri verkætlanini framyvir.

Bólkurin hevði regluligar fundir millum oktober 2015 og februar 2016.
Jóannes Petersen arkitektur hevur framt byggiskránna og endaliga latið hana til Klaksvíkar kommunu tann 26-03-2016.

Verður byggiskráin góðkend av viðkomandi nevndum, er næsta stig at projektera eina rennibreyt við fótbóltsvølli og møguligari tekju, grundað á byggiskránna.

Lógargrundarlag:
Víst verður til byggiskránna dagfest 26-03-2016.

Fíggjarligar avleiðingar:
Víst verður til byggiskránna dagfest 26-03-2016.

Tilmæli:
Byggiskráin verður hervið løgd fyri viðkomandi nevndir til góðkenning.
Víst verður til byggiskránna: ”Vígvøllurin við másheygg”, dagfest 26.03.2016.

UBN 11-04-2016: Nevndin tekur undir við tilmælinum frá teknisku umsiting, dagf. 05-04-2016.

MeN 11-04-2016: Nevndin tekur undir við UBN 11-04-2016 og mælir til at fyrireika projekteringina og leggja fyri næsta nevndarfund.

TN 13-04-2016: Nevndin tekur undir við UBN og MeN 11-04-2016.

FíN 19-04-2016: Nevndin tekur undir við UBN og MeN 11-04-2016 og TN 13-04-2016 og at fyrireika projekteringina av fyrsta byggistigi og leggja fyri næsta nevndarfund.

Býráðsins samtykt 21-04-2016
Tilmælið frá FíN 19-04-2016 einmælt samtykt.

FRAMMANFYRI STANDANDI MÁL ERU VIÐGJØRD Á ALMENNUM FUNDI